


www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 11 - 2012

# Statoil nr. 6 av heimsins mest týðandi oljufeløgum

Eftir bara tveimum árum hevur norska oljufelagið Statoil tikið seg fram frá einum 27. plássi til eitt 6. pláss sum heimsins mest týðandi oljufelag. Hvørt ár verða tey mest týðandi olljufeløgini í heiminum útnevnd millum tilsamans 250 feløg. Sambært DN.no liggja nú bert fimm feløg frammanfyri Statotil. Fyri at koma á henda listan mugu feløgini standa seg væl innan fleiri øki, eitt nú virðisøking, inntøkur, úrslit og avkast. Ovast á listanum yvir mest týðandi oljufeløg í heiminum er framvegis ExxonMobil. Statoil, sum varð á einum 27. plássi fór niður á eitt 12. pláss nøkur ár herfyri og er nú endað á einum 6. plássi. Heimsins mest lønandi olju/gassfelag við einum avkasti av kapitalinum uppá 35,5% er russiska gassfelagið OAO Novatek. Til sammetingar hevur Statoil eitt avkast uppá 19%. ExxonMobil liggur á 23%.